FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Mannagongd fyri vali av umboðum í RTL (RTL) á Fróðskaparsetri Føroya.

Samsvarandi **Reglugerð fyri RTL á Fróðskaparsetri Føroya** verður boðað frá, at mannagongdin fyri vali av umboðum til ráðið verður henda:

**§ 1 Grundleggjandi ásetingar**
Umboð verða vald fyri 1 lestrarár og skipast skal fyri vali eina ferð um árið.

Stk. 2. Valið verður skipað eftir lestrarársbyrjan og í seinasta lagi 30. september.

Stk. 3. Ráðið er skipað við í mesta lagi 10 sessum, umframt møguligum varaumboðum.

**§ 2 Valrætt og valbæri**
Øll lesandi, sum eru innskrivað á Setrinum tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, hava valrætt og eru valbær.

**§ 3 Skipan av valinum**
RTL skipar fyri vali eftir hesum leisti:

1) RTL ásetur valdagin og kunnger hann í seinasta lagi 3 vikur áðrenn.

2) RTL tryggjar, at øll lesandi verða kunnað um møguleikan at stilla upp.

3) Tey, ið ynskja at stilla upp til val, lata RTL váttan um uppstilling í seinasta lagi 2 vikur áðrenn valdagin.
    i. Um færri stilla upp enn tað eru sessir í Ráðnum, ber til at stilla upp á aðalfundinum. Tá hetta verður gjørt, verður valið treytað av, at RTL saman við Lestrarskrivstovuni kann vátta valbærið aftan á aðalfundin.

4) RTL góðkennir vallistan, eftir at Lestrarskrivstovan hevur váttað valbærið hjá valevnunum.

5) RTL skal saman við Lestrarskrivstovuni tryggja, at øll lesandi fáa vallistan sendan til sín lestrarteldupost, umframt at tey kunna lýsa við honum á øðrum miðlum.

6) RTL tryggjar, at øll lesandi við valrætti hava møguleika at velja.
    i. Í fyrstu atløgu verður valt eftir deild, og har kann tann lesandi seta hægst tveir krossar til hvørja deild.
    ii. Um sessir enn eru eftir í ráðnum eftir at deildarvalini er avgreidd, verður restin av teimum, sum stilla upp, vald á einum felags lista. Á hesum lista kann hvør lesandi seta ein kross fyri hvønn sess, ið er eftir at velja. Bert ein av sessunum hjá deildini kann latast aðrari deild á hendan hátt.
    iii. Tey uppstillaðu, ið ikki verða vald, kunna gerast varaumboð í ráðnum. Varasessir verða tá givnir eftir, hvør hevði hægsta tal av atkvøðum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

7) RTL telur atkvøðurnar upp og kunnger valúrslitið. Valúrslitið verður kunngjørt seinast 3 yrkadagar eftir, at valið er avgreitt.

Mars 2021
Fróðskaparsetur Føroya

Sonni Johnson

**Sonni Oddbjørn Johnson**
Formaður fyri Ráð teirra lesandi

**Chik Collins**
Rektari á Fróðskaparsetri Føroya